# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Føðingardagsheilsan til

## Trinu Hansen

### Árnafjørður

### fødd 20.11.1914



Góða omma og langomma. Nú fyllir tú 90 ár. Ja, tú hevur upplivað nógv í tínum lívi.

Tú hevur fortalt okkum nógv, sum tú hevur upplivað. Eg hugsi mangan, hvussu gott minni tú hevur enn, nú tú fyllir 90 ár.

Tú fekst eina dóttir (mammu), og hon giftist inn til tín og Akka, sum tú bleiv gift við.

Tú fekst fýra ommubørn: Fíu, Niklas, Atla og meg, og 13 langommubørn.

Eitt so tolið menniskja sum tú er ringt at finna. Altíð í góðum lag.

Míni børn eru so glað fyri at koma norð at vitja lengu, ommu og abba. Tí tey verða so væl móttikin, tá tey koma.

Altíð er okkurt at gera hjá børnunum har norði, tí tit búgva beint við sandin og fjøruna. Tað er so gott og friðarligt, ikki nógvir bilar at ansa eftir.

Tú hevur verið bóndi, men nú er mamma bóndi. Tú segði ikki festið frá tær, fyrr enn tú vart heilt gomul. Seygahugin hevði tú góðan, kendi hvønn seyð í bygdini.

Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum og nógv góð ár framyvir. Guds ríku signing, og at tú fært ein góðan dag.

**Katrin v/fam.**

# Tøkk



Góðu tit, sum stuðlaðu meg til býráðsvalið 09. november 2004. Hjartans tøkk.

**Vinarliga
Jógvan Krosslá**

# Jukim Olsen 75 ár



Í morgin, sunnudagin 21. november, verður Jukim Olsen 75 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Hafna fyrrapartin í dag, har tað frá kl. 9 og inntil klokkan eitt verður opið hús. Hóast Jukim størsta partin av lívinum hevur búð í Havnini, so ivast eingin í, sum hoyrir hann, at Jukim er svínoyingur. Bæði í talumáta, málburði og hugsan. Hann eigur hús í Svínoy, og har vitjar hann framvegis ikki so sjáldan.

Foreldrini vóru Jógvan Olsen ella Jógvan á Geilini, sum hann varð nevndur, og Elsebeth Malena Justinussen Uppi í Húsi í Svínoy. Jukim er yngstur av fýra brøðrum. Hinir vóru Petur, Olivur og Esbern. Pedda og Esbern, sum báðir búðu í Svínoy, eru farnir, Olivur býr í Klaksvík, og Jukim býr í Havnini. Hann giftist 7. september 1957 við Elsebeth, sum var næstyngst av fýra børnum hjá Ellu og Andrew Sloan. Elsebeth hevði havt fylt 68 12. oktober, sum hon doyði 25. september í 2000. Tað var stórur smeitur hjá Jukim at missa konuna. Men hann hevur eisini hesi seinastu árini verið virkin og glett seg í og saman við familjuni og øllum vinunum, sum hann eigur. Elsebeth og Jukim fingu trý børn: Elin, Jógvan og Katrin. Tær báðar búgva í Havnini, og Jógvan býr í Svínoy.

Undir krígnum luttók Jukim í vanliga bygdarlívinum í bø, haga og á floti. Hann hevði m. a. eitt skifti ábyrgdina av at útflýggja agn úr íshúsinum, sum útróðrarmenninir í Svínoy høvdu bygt.

Í 1946 fór Jukim til skips. Fyrstu fimm árini sigldi hann við Bjørgvin, sum Julius á Syrðadalið átti. Hjalmar á Syrðadali var skipari, og beiggi hansara Símun og Petur í Fugloy, sum teir róptu hann, vóru bestimenn. Í 1952 var hann aftur við syðradals-monnum, sum hann altíð síðani hevur kent væl og hildið nógv av. Tá var hann við Gudrun, sum Vilhelm á Syðradali førdi.

Polo var fram um øll hini skipið hjá svínoyingum. Síðsta árið hjá Símuni hjá Póli sum skipara og Edvardi hjá Símuni Júst sum bestamanni var í 1951. Hetta árið var Jukim við Polo. Hann plagar at taka til, hvussu hugaligt tað var hetta summarið at rógva út við Killaranum í Íslandi og at hava Edvard og Pedda úti á Hædd sum bátsfelagar.

Veturin 1946-47 var Jukim á Háskúlanum. Í 1952 fór hann til Svøríkis á Kungalv háskúlan. Jóannes av Skarði var nevndarlimur í hesum skúlanum. Hann uppmuntraði Jukim at fara til Svøríkis, og Jukim tosar framvegis um góðu mánaðirnar, sum hann hevði har yviri. Har víðkaðist sjónarringurin nógv. Hann lærdi norðurlendsk mál og mentan, og har fann hann vinir fyri lívið. Tey hava framvegis samband hvørt við annað, tey hava ofta verið saman, og tað er ikki longri síðani enn í summar, at Jukim saman við floksfeløgum frá fyri meiri enn hálvari øld síðani vitjaði í Hetlandi.

Áðrenn hann á heysti í 1955 fór á stýrimannaskúla, hevði Jukim siglt við norðmonnum og eisini við Norðlýsinum, sum Hanus hjá Amalju førdi. Tá ið hann í 1957 hevði lokið stýrimansprógv í Havnini, flutti familjan til Keypmannahavnar, har Jukim leyk skipsførarauprógv. Síðani sigldi hann í nøkur ár kring so at siga allan heimin við skipum hjá Lauritzen.

Jukim plagar at taka til, at hann var í Indiska havinum á veg til Kina, tá ið hann fekk telegramm frá konuni, sum segði honum frá kjansi við doktarabátinum Reyða Krossi. Hann kendi seg hava møguleika at fáa og missa, um hann so valdi at halda fram at sigla, ella um hann legðist heima og fór at sigla við doktarabátinum. Jukim valdi Reyða Kross, og tað angraði hann ongantíð. Saman við Martini Tórgarð og øðrum sigldi hann kring oyggjarnar í 1963 og fram til á sumri í 1964, tá ið hann fekk starv á Matrikulstovuni, har hann var í 32 ár.

Á Matrikulstovuni kom Jukim so at siga aftur til røturnar. Ogn og kongs, matrikulering og bonitetur og útskifting kendi hann væl til frá barna- og ungdómsárunum í Svínoy. Grannastevnur og útskifting fullu honum ræði. Jukim tók skeið í matrikulering og sum tekniskur assistentur, og hann treivst væl í arbeiðnum og saman við arbeiðsfeløgunum.

Søga og samfelag hava altíð havt Jukimsa serliga áhuga. Foreldrini vóru bæði fróðarfólk, tað vóru onnur í familjuni eisini, og Jukim sat undir og legði sær væl í geyma. Hann er ættkønur sum fáur, og at hann veit nógv um Svínoynna kom ikki minst til sjóndar, tá ið hann saman við Niels Juel Arge, sála, ferðaðist kring oynna og fleiri útvarpssendingar, sum væl høvdu tolt at verið sendar enn eina ferð, spurdust burturúr.

Í samkomuni í Ebenezer hevur Jukim verið trúfastur. Hann hevur altíð verið klárur at hava eitt orð, og tað er eingin endi á vitjanum í heimum, á sjúkrahúsum og røktarheimum og persónligar samrøður úti á vegnum og í telefonini, sum Jukim hevur kent og framvegis kennir sum sína serligu uppgávu at røkja.

# Smátúgvur fæst eisini í Havn

TÍÐINDASKRIV




Yrkingarsavnið "Smátúgvur", sum Niels Petur Nolsøe í Vági hevur givið út, fæst umframt í bókasølunum í Vági og Tvøroyri eisini hjá Hjalmar Jacobsens bókhandli, og H.N. Jacobsens bókahandli í Havn.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Tórgerð og Hjørleif Waag Høgnesen gullbrúdleyp



Í dag, leygardagin 20. november, eru tað liðin 50 ár síðani, at Tórgerð og Hjørleif Waag Høgnesen í Klaksvík gingu saman í hjúnalag. Tey bæði hava hesa hálvu øldina búð á Vágsheygnum. Tey eiga og reka handil hinumegin Uppsalagøtu, og Hjørleif er framvegis organistur í Christianskirkjuni. Stóri dagurin verður hildin í kjallaranum í Christianskirkjuni frá kl. 4 seinnapartin í dag.

Tórgerð, sum er fødd 17. september í 1930, er ættað úr Hattarvík. Foreldrini vóru Elsebeth Maria og Símun Petur Thomassen. Mamman var av Fløtti á Kirkju, og pápin var úr Svínoy. Tey bæði giftust í 1923, og tey fingu tvær døtrar. Alisa, sum var fødd í 1927, og sum doyði í mars í 2000, og Tórgerð, sum er fødd 17. september í 1930. Tær búsettust báðar í Klaksvík, hagar foreldrini fluttu í 1956.

Hjørleif er føddur 13. januar í 1925. Foreldrini hjá honum vóru Turid og Jóan Magnus Høgnesen. Hon var úr Tunghúsinum í Vági, og hann var úr Leirvík. Teimum var ikki unt at liva leingi saman í hjúnarlagi. Hjørleif var fimm ára gamalur og elstur av fýra brøðrum, tá ið pápin 26. mars í 1930 fórst við skonnartini Ernestinu. Yngru beiggjarnir vóru Róland, Símun og Hjalmar.

Tá ið Tórgerð var komin til Klaksvíkar, tænti hon í fleiri húsum. Hon var eitt nú í húsinum hjá Rasmussen, presti, hjá Símuni Petur Zachariassen, seymaði hjá Skraddaranum og tænti eisini hjá Evaldi Kjølbro.

Hjørleif arbeiddi hjá mammubeiggjanum, Einari Waag, har hann var bilførari. Seinni fór hann undir egið virksemi, og eitt langt skifti mundi hann teljast millum teirra í Klaksvík, sum høvdu flest fólk í arbeiði. Hjørleif hevði bilstøð, hann átti sjálvur nógvar hýruvognar og buss, sum koyrdi runt vánna, og seinni hevði hann bilverkstað, har bæði bilar hjá honum og øðrum vórðu umvældir.

Tórgerð stuðlaði Hjørleifi í øllum hesum virkseminum, sum var undir somu lon sum tey búðu. Seinastu fleiri enn tríati árini hava tey bæði rikið matvøruhandilin, sum Niels Michael Knudsen í síni tíð fór undir á Vágsheygnum. Tey eru sera fyrikomandi at hitta. Bæði heima við hús og á arbeiðsplássinum.

Tórgerð og Hjørleif eiga fýra børn: Turið, Eyð, Lív og Leif. Tey búgva øll í Klaksvík. Barnabørnini eru seks.

Trúfesti, gudsótti og gott hjartalag hava eyðkent lívið hjá teimum báðum. Hjørleif er sjálvlærdur organistur, og í fleiri enn 30 ár hevur hann verið organistur í Christianskirkjuni, og tað er hann framvegis. So at siga alla sína tíð hevur hann verið organistur í Emmaus, har hann í skiftum eisini hevur stjórnað kóri. Átjan ára gamalur fór hann í 1943 undir at savna løg, og í 1951 gav Kirkjuliga Missiónsfelagið nótabókina hjá Hjørleifi út. Millum løgini vóru fleiri, sum Hjørleif sjálvur hevði gjørt. Saman við Hans Erlandi í Brekkum, Martin R. Jacobsen, Torkil Beder og Knút Olsen sat Hjørleif í nevndini, sum fyrireikaði útgávuna av Koralbókini.

Í fleiri enn 40 ár koyrdi Hjørleif skúlabørnini uttan av Oyri til og frá skúlanum í Klaksvík. Skúlabørnini á Oyri eru hjartabørn hjá Hjørleifi, og tey eru góð við hann. Hann var kongaligur sjaførur, og hann hevur fingið medalju frá kongi.

Tað sigur ikki so lítið um hjartalag og trúfesti, at mamma Hjørleif, Turid, búði alla sína tíð undir somu lon sum elsti sonurin, og at foreldrini hjá Tórgerð fluttu til dóttrina og versonin at búgva, tá ið tey vóru vorðin veik og gomul.

Hóast høgan aldur so fylgja Tórgerð og Hjørleif framvegis væl við. Tey hava vakið eyga við tí einstaka, og Hjørleif er ógvuliga áhugaður í politikki. Bæði heima á landi og kring allan heimin, og hann hevur altíð verið sera íðin javnaðarmaður.

Sigurd Danielsen, Tórshavn:

# 7 ára gamal rann og vann flogferðina

Tá Almanna- og heilsumálaráðið skipaði fyri fólkaheilsurenning fyrr í heyst, var lutakast tikið millum tey sum luttóku, um eina ferð til Danmarkar fyri ein persón við Atlantic Airways.

7 ára gamli havnardrongurin, Sigurd Danielsen, var ein av luttakarunum.

Nakrir dagar seinni ringdi ein frá Bragdinum og boðaði frá, at Sigurd hevði vunnið ferðaseðilin.

Tá hann fekk tað at vita, var hann ikki so øgiliga glaður, heldur óttafullur.

Hansara fyrsti spurningur var, um hann so noyddist einsamallur til Danmarkar.

Tá hann so fyri nøkrum døgum fekk ferðaseðilin sendandi við postinum, hevði hann fingið at vita frá foreldrunum, Ingun og Per Danielsen, at hann sjálvandi ikki skuldi einsamallur til Danmarkar.

Tað eru nokk fleiri sum kennast við navnið, Sigurd Danielsen. Sigurd er nevniliga abbasonur kenda handilsmannin í Havn, Sigurd Danielsen, sála, sum í fleiri ár hevði handilin "Grønlandsbúðina" við Grønlandsvegin, og seinni handlaði í Bókbindaragøtu.



*Sigurd Danielsen við brævbjálvanum við ferðaseðlinum frá Atlantic Airways*

## Borgarafundur um kirkju

Ein partur av býarplaninum í Hoyvík er, at nýggj kirkja skal byggjast. Ætlandi verður farið undir arbeiðið í komandi ári.

Í hesum sambandi verður leygardagin skipað fyri almennum borgarafundi. Fundurin verður hildin í Hoyvíkar skúla kl. 14.

Á fundinum verða tekningar og modell av kirkjuni at síggja, og koma arkitektarnir Albert Isfeldt og Gudmundur S. Hansen at greiða frá verkætlanini. Somuleiðis verður bygginevndin, ið hevur arbeitt við ætlanini, at hitta á fundinum.

**-jm**

## Nýggj lánsbrøv

Landsbankin gevur mikudagin út tvær nýggjar røðir av lánsbrøvum. Samlaða upphæddin fyri lánsbrøvini er 750 mió kr., og skulu hesar nýtast til at endurfíggja verandi lánsbrøv.

Býtið er soloeiðis, at 350 mió kr. verða lánsbrøv yvir eitt ár, har rentan er 2,5%. Hinar 400 mió kr. eru so lánsbrøv á 4 ár, og har er árliga rentan 4,25%.

Lánsbrøvini verða noterað á íslendska virðisbrævamarknaðinum. Kursurin á nýggju lánsbrøvunum varð mikudagin ásettur beint niðanfyri 100.

**-jm**

## Forum um nýskapan

25. og 26. november skipa Menningarstovan og Vinnuhúsið fyri tveimum evnisdøgum á Hotel Hafnia. Báðir dagarnir byrja kl. 13:30 og enda við buffet og hugna í Hafnia Lounge

## Menningarstovan

TÍÐINDASKRIV

Endamálið við báðum døgunum er at savna føroyskar fyritøkur í eitt forum, har nýskapan í arbeiðsgongdum innan altjóðagerð er høvuðsevnið. Hesir dagar leggja dent á nýskapan í teimum mannagongdum, sum eru í sølu- og útflutningsliðinum hjá fyritøkuni.

Fyrri dagurin, 25. november er ætlaður framleiðslu- og tænastufyritøkum, sum longu útflyta ella hava ætlanir um at útflyta. Seinni dagurin, 26. november, er ætlaður verandi útflutningsvirkjum innan fiskaútflutning.

Fyritøkan GEMBA Innovation, sum er ein ráðgevingarfyritøka við drúgvum royndum á nýskapanarøkinum, luttekur á evnisdøgunum við áhugaverdum fyrilestrum, sum taka støði í royndum og verkætlanum, sum Gemba hevur gjørt í samstarvi við Danmarks Eksportråd og Dansk Industri. Harafturat luttekur Gemba við workshops, sum taka útgangsstøði í gerandisdegnum hjá føroysku fyritøkunum og teirra møguleikum og avbjóðingum á altjóða marknaðinum.

Føroyskar fyritøkur hava styrkina og liðiligleikan at vera nýhugsandi í framleiðsluni. Men spurningurin er, um fyritøkur mangla nýhugsan í sølu- og útflutningsliðinum. Kundi eitt »útflutningsforum«, har høvi var at viðgera marknaðar- og útflutningsspurningar tvær ferðir árliga, givið vinnuni íblástur? Meiri um kostnað og tilmelding á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo
Avmarkað atgongd.